# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Lat okkum takka Guði fyri, at so mong kunnu njóta tað frælsið, sum sprettur úr demokratii og mannarættindum*

*(Benedikt pávi)*

# Biskupur teirra fátæku verður forseti

**Fyri fyrstu ferð í meiri enn seksti ár hevur Colorado-flokkurin mist valdið í suðuramerikanska landinum Paraguay**

Andstøðuvalevnið Fernando Lugo vann um vikuskiftið forsetavalið í Paraguay. Sigurin var greiður. Fernando Lugo fekk 41 prosent av atkvøðunum, meðan valevnið hjá í konservativa Coloradoflokkinum, Blanca Ovelar, fekk 31 prosent. Eitt triðja valevni, fyrrverandi generalurin Lino Oviedo, fekk umleið 20 prosent.

Coloradoflokkurin hevur havt valdið í Paraguay í 61 ár uttan steðg, harav tann illa gitni einaræðisharrin og Alfredo Stroessner ráddi í 35 ár.

Blanca Olevar vónaði, at hon kundi fáa heiðurin sum tann fyrsta kvinnan í forsetaembætinum í Paraguay, men í nátt mátti hon ásanna, at tað verður hon í hvussu er ikki á hesum sinni. Samstundis ynskti hon Fernando Lugo tillukku við sigrinum.

- Í dag hava vit ein dreym um eitt øðrvísi land, eitt Paraguay, sum fólk skulu minnast fyri annað enn korrupsjón og fátækradømi, segði Fernando Lugo, tá tað var greitt, at hann hevði vunnið valið.

- Hetta úrslitið vísir, at tey smáu í samfelagnum kunnu eisini vinna. Hetta er tað Paraguay, sum eg droymi um - eitt Paraguay við nógvum litum, nógvum andlitum, eitt Paraguay fyri øll, segði Lugo, meðan viðhaldsfólk í túsundatali fagnaðu honum í miðbýnum í høvuðsstaðnum Asunción.



*Fernando Lugo lovar fólkinum eitt øðrvísi Paraguay við størri sosialum rættvísi (Mynd: Polfoto)*

### Biskupur teirra fátæku

Tann 56 ára gamli Fernando Lugo er fyrrverandi katólskur biskupur. Hann hevur í mong ár verið talsmaður fyri tey fátæku í Paraguay, og hetta hevur givið honum heitið "Biskupur teirra fátæku".

Undir valstríðnum hevur hann lovað fólkinum størri sosialt rættvísi og at berja ta umfatandi korrupsjónina niður. Hann hevur lovað at umskipa ognarviðurskiftini til landbúnaðarjørðina, soleiðis at smábøndurnir skulu fáa betri rættindi. Í Paraguay er tað so, at tað eru nøkur fá múgvandi, sum eiga tað mesta av jørðini.

Hansara mótstøðufólk hava roynt at tengja hann at vinstrasinnaðum leiðarum sum Hugo Chávez í Venesuela og Evo Morales í Bolivia, men sjálvur sigur Fernando Lugo seg vera óheftan, og hann leggur dent á, at Paraguay skal finna sína egnu leið.

### Misti heitið

Hvussu er og ikki, so hevur Fernando Lugo mist heitið sum biskupur, tí hansara politiska virksemi fall ikki í góða jørð í Vatikaninum í Rom.

Hann fór av álvara upp í politikk fyri tveimum árum síðani, tá hann skipaði fyri einari mótmælisgongu, har 40.000 fólk mótmæltu politikkinum hjá sitandi forsetanum, Nicanor Duarte. Aftaná tók hann við sum oddamaður hjá einum vinstraflokki, sum er ein samgonga av bóndafelagsskapum, fakfeløgum og politiskum flokkum.

# Varð tvingaður upp í Hitlerjugend



*Benedikt pávi varð tvingaður upp í Hitlerjugend og at gera hertænastu fyri nazistarnar (Mynd: Polfoto)*

**Fyri fyrstu ferð hevur Benedikt pávi tosað alment um uppvøksturin í Nazitýsklandi**

Tað var á ferðini í USA, at pávin fyri fyrstu ferð greiddi frá sínum ungu árum, tá nazistarnir ráddu fyri borgum í Týsklandi. Millum annað segði hann, at hann bleiv tvingaður upp í Hitlerjugend, sum var ungdómsdeildin hjá nazistaflokkinum NSDAP. Tað var skylda hjá øllum týskum ungdómi millum 14 og 18 ár at vera limir í Hitlerjugend.

Benedikt pávi greiddi eisini frá, at ímóti endanum á seinna heimsbardaga bleiv hann sendur í herin, men at hann flýddi haðani. Eitt skifti var hann krígsfangi, og tá hann slapp leysur, fór hann at lesa guðfrøði.

## STUTT SAGT

### Labour missir veljarar

Var val til bretska Parlamentið nú, hevði stjórnarflokkurin Labour fingið 29 prosent av atkvøðunum ella trý prosentstig minni enn fyri bara fjúrtan døgum síðani. Tað sæst í einari meiningakanning, sum blaðið Sunday Mirror prentaði í gjár. Kanningin gevur tí konservativa flokkinum 40 prosent, og teir liberalu høvdu fingið 19 prosent, var val nú. Eitt úrslit sum hetta hevði gjørt, at tann konservativi flokkurin hevði fingið 25 sessir í meiriluta í Parlamentinum. Sunday Mirror skrivar, at Gordon Brown, floksformaður og forsætisráðharri, hevur ikki havt tað lætt, síðani hann tók við eftir Tony Blair seinasta summar.



*Gordon Brown*

### Mugabe fær vápn úr Kina

Eitt kinesiskt farmaskip, sum er fermt við vápnum til stýrið í Zimbabwe, slapp ikki at leggja farmin upp í Suðurafrika sum ætlað. Suðurafrikanski hægstirættur hevur boðað frá, skipið kann leggja farmin upp har, men at tað er ikki loyvt at flyta vápnini úr Suðurafrika til Zimbabwe. Tað kinesiska skipið helt til leiðina fram til Angola, sigur CNN.

Í Zimbabwe eru myndugleikarnir í ferð við telja atkvøðurnar frá valinum herfyri av nýggjum. Kofi Annan, fyrrverandi ST-aðalskrivari, ávaraði um vikuskiftið um, at støðan í Zimbabwe er sera spent, og at spenningurin kann breiða seg til londini í grannalagnum.